# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Gunnar H. Gunnarsson 50 ár



Sunnudagin 12. februar fylti Gunnar H. Gunnarsson í Havn 50 ár.

Gunnar er føddur og uppvaksin í Havn. Hann tók HF-prógv í Hoydølum, áðrenn hann fór til Danmarkar at lesa til byggifrøðing.

Hann hevur nú í mong ár arbeitt sum byggifrøðingur hjá Árni Winther arkitektum. Eitt skifti arbeiddi hann hjá Tórshavnar býráð.

Gunnar hevur stóran áhuga fyri bygging og byggilist. Hann hevur ígjøgnum árini havt eftirlit við nógvum bygningsverkum í sínum arbeiði sum byggifrøðingur.

Foreldrini hjá Gunnar eru Jenny, f. Mikkelsen, av Toftum (1924-1999), og Eigil Gunnarsson úr Vági.

Gunnar er giftur Berit Jensen úr Havn, tey eiga børnini Egil, 18 ár, og Jónu, 16 ár.

Føðingardagin var Gunnar burturstaddur.

Camping.fo:

## Vetrarkamping yviri við Strond

**Í vikuskiftinum var lív í á kampingplássinum yviri við Strond í Havn. Talan var um fyrsta "kampingtreffið" hjá felagnum Camping. fo , sum varð stovnað í fjør**

CAMPING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Í vikuskiftinum var campingtreff hjá felagnum Camping.fo á campingplássinum yviri við Strond*

Campistarnir møttu á campingplássinum yviri við Strond leygardagin í fínasta veðri. Fríggjakvøldið var av ringasta veðrið við vindi og nógvum regni, men leygarmorgunin sleit hann í og restina av vikuskiftinum var fínasta veður.

Tilsamans 10 kampingvognar av ymiskum sløgum vóru á plássinum, og tey flestu yvirnáttaðu til sunnudagin.

Ivan Skorheim formaður í Camping.fo sigur, at hetta var fyrsti túrur hjá felagnum, og var hetta samstundis ein limafundur, har limirnir kundu tosað saman um felags ætlanir, og um hvat tey ynskja at fáa burtur úr felagnum.

Tiltakið var eisini fyri at prógva, at tað ber væl til at hava campingtreff um veturin. Spurdur um hetta er rætta tíðin til kamping, sigur Ivan, at flestu vognarnir eru so væl isoleraðir, at tað er sum at vera heima, heitt og fjálgt.

Treffið eydnaðist sera væl, og familjurnar fingu eina góða uppliving og eitt hugnaligt vikuskifti, sigur Ivan Skorheim.

---

†

### Andlát og jarðarferðir

**Hans Magnussen,** Tjørnuvík, andaðist í heiminum leygardagin, 82 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Tjørnuvíkar kirkju týsdagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, sum vilja minnast Hans, kunnu lata kirkjuni í Tjørnuvík eina peningagávu. Konto í Føroya Sparikassa.

**John (Jonn) Johannesen** á Skála, vanliga nevndur John á Berjarheygnum, andaðist í heiminum hjá dótturini leygardagin 11. februar, 90 ára gamal. Farið verður úr heiminum sunnudagin 12. februar kl. 15. Jarðarferðin verður úr Skála kirkju týsdagin 14. februar kl. 14.

Tey, ið vilja minnast John, kunnu lata Skála kirkju eina peningagávu. Konto í Føroya Banka.

**Erlant Jacobsen á Argjaboða**, ættaður úr Leirvík, andaðist fríggjadagin 10. februar á Landssjúkrahúsinum, 68 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum sunnudagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju mánadagin kl. 13.

Tey, sum vilja minnast Erlant kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu. Konto í peningastovnunum.

---

### Dagurin í morgin

**14. februar. Valentinus**. Fleiri halgimenni bera hetta navnið. Í angulsaksiskum londum, serliga í Amerika, senda gentur og dreingir hvør øðrum gávur ella skrivligar ástarkvøður, *valentines*, á hesum degi. Navnið er latín og merkir raskur ella kraftarmikil. *Jens Kristian Svabo doyði hendan dagin í 1824, 78 ára gamal.*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hans Magnussen**
Tjørnuvík

andaðist í heiminum 11. februar, 82 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Tjørnuvíkar kirkju týsdagin 14. februar kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Thora, Steinbjørn, Hensar, Arnbjørg og Tórhild v/ familju**

*Tey, ið vilja senda blómur ella krans, kunnu í staðin lata Tjørnuvíkar kirkju eina peningagávu, konto í Føroya Sparikassa.*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara góði pápi, verpápi, abbi, langabbi og bróðir

**John Johannesen**
(vanliga nevndur John á Berjarheygnum)
Skála

andaðist í heiminum hjá dóttrini, leygardagin 11. februar, 90 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Skála kirkju týsdagin 14. februar kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Marna, Niels og børnini**

*Tey, ið vilja minnast John kunnu lata Skála kirkju eina peningagávu, konta í Føroya Banka.*

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo